# r lut í nstarvi




Bjørk Olsen, forkvinna í HUXA, saman við Anders Vistisen úr Dansk Folkepartis Ungdom



Í alt 50 ungfólk úr øllum Norðurlondum tóku lut í tingsetuni hjá Undómsins Norðurlandaráði. UNR hevur umboð í Norðurlandaráðnum, ið vegna ungdómsráðið leggur fram tey mál, ið ungdómsráðið hevur samtykt, og hevur ungdómurin tí eisini ávirkan á tann førda felagspolitikkin hjá Norðurlondum

saman og fordøma gerðini hjá bretsku stjórnini mótvegis Íslandi, har teir nýttu eina anti-terror lóg til at niðurfrysta allar ognir hjá íslendskum bankum í Bretlandi, við tí úrsliti at bankarnir fóru á heysin.

Tá vístu øll, at Norðurlond veruliga hava nøkur felags eyðkenni og nakrar kenslur mótvegis hvør øðrum, júst eins og brøður hava tað. Lógvabrestirnir rungaðu í tingsalinum, eftir at málið var samtykt, og sigast má at hetta var ein søgulig løta í søguni hjá UNR.



Fýra av føroysku umboðunum fáa sær ein bita og kjakast um ymisk mál, ið verða viðgjørd undir setuni. F.v. Rógvi Nybo, Una Egilsdóttir, Rói B. Poulsen og Miriam Michelsen